# Fýra garpar úr Fireball

FYRI 25 ÁRUM SÍÐANI
*Eirikur Lindenskov*

»Hornið« var fastur táttur á baksíðuni í Sosialinum í sjeyti- og áttatiárunum. Har varð víst einhvør skemtilig ella á annan hátt áhugaverd mynd við stuttum teksti til.

Tann 28. januar í 1978 hevur myndamaðurin hjá Sosialinum verið fram við Brúna skúla í Havn - ella Heimara Skúla, sum lærararnir á Venjingarskúlanum plagdu at kalla henda skúla, sum millum næmingar bara varð kallaður Brúni Skúli.

Á myndini eru fýra dreingir. Teir gingu tá allir í sjeynda flokki á Venjingarskúlanum. Teir eru Rúni Árting, Kaj Leo Johannesen, Ragnar Egholm og Mortan Borgarlíð, sum doyði í 1983.



*Rúni Árting, Kaj Leo Johannesen, Ragnar Egholm og Mortan Borgarlíð gingu allir í 7. flokki á Venjingarskúlanum í januarmánaði í 1978*



*Teir »tríggir varðarnir« vóru eisini á bókakvøldinum, har teir sóu seg sjálvan á hvíta tjaldinum. »Varðarnir« vóru matu skald okkara, William Heinesen, Christian Matras og Heðin Brú, sum allir búðu Undir Varða í Havn. Á myndini síggjast teir saman við konum*

# »Tríggir varðar« á bókakvøldi

Rithøvundafelagið skipaði fyri væleydnaðum bókakvøldið í nýggja skúlanum í Hoyvík fyri 25 árum síðani, har m. a. filmurin um trý av matastu skaldum okkara varð sýndur

FYRI 25 ÁRUM SÍÐANI
*Eirikur Lindenskov*

Tann 1. februar í 1978 skrivar Sosialurin um forkunnugt bókakvøld, sum Rithøvundafelagið hevur skipað fyri í Hoyvík. Endamálið var at savna pengar til Rithøvundafelagið.

Okkurt um 250 fólk vóru til tiltakið, sum varð hildið í nýggja skúlanum í Hoyvík.

– Kvøldið eydnaðist sera væl. Inn komu 7.200 krónur, og tá útreiðslurnar eru goldnar vera umleið 5.500 krónur eftir, sigur Karsten Hoydal, formaður Rithøvundafelagsins, við blaðið.

Kvøldið byrjaði við upplestri, síðani vórðu vístir tveir filmar, »Tríggir varðar« sum var um William Heinesen, Christian Matras og Heðin Brú,, og »Føroysk dansispøl«, sum Eyðun Andreassen hevði gjørt. Kvøldið endaði við so við burturlutuing av bókapakkum og upphoðssølu.

Sagt verður eisini , at Rithøvundafelagið, sum nú hevði um 60 limir, ætlaði at halda fram við slíkum tiltøkum..

## EG MEINI TAÐ

# Royking fyri tey djørvu



*Katrin Petersen skrivar*

Mín roykjaraæra bleiv fornermað á nýggjárinum. Ikki tí fólk bóðu meg leggja av - tað gera tey hvørt nýggjár og eg nikki og sigi, at tað hevði ikki verið so býtt - nei, hetta eri eg von við.

Nei, tað var meira tað almenna átakið, sum fornermaði meg. Ikki tí - tað ER skaðiligt at roykja. Og tað ER upp á sítt pláss at royna at fáa okkum at leggja av at roykja. So tað royndi ein lækni í eini sjónvarpslýsing. Har sat hann í hálvaskýming og fortaldi okkum við spakari rødd, at hann tordi so ikki at roykja.

Okey. Eitt sindur av funderan um útveljing av málbólkum. Hvønn ætlaði Fyribyrgingarráðið at raka. Tannáringar, sum onkuntíð hava fingið sær ein guv, men enn ikki eru roykjarar?

Hvussu man tað síggja út í teirra eygum, at einhvør í hvítum kitli spælir heilagur og sigur, at hann ikki torir at roykja? Hvat annað er hann ov ræddur til? At koyra bil í nógvum vindi? At leypa av ovastu vippu í svimjihylinum?

Tá eg byrjaði at roykja, var tað nevniliga at tora, at vera kul, at roykja. "Eg royki, um EG vil." Og tað er kanska ein leivd av tannáringi sum situr í mær enn, og fær meg at lyfta einu eygnabrúnna forhánisliga, tá ein vaksin maður situr har og sigur, at hann ikki torir at roykja.

Og eg kann hugsa mær at teir veruligu tannáringarnir fáa somu boð sum eg frá dulvitskuni. Sum tannáringar síggja verðina, so eru vaksin býtt. Og vaksin, sum royna at læra teg okkurt, eru tey allarbýttastu. Hvussu man so ein álvarsamur og seigligur maður, sum ikki torir at roykja, virka? Nettupp. Stikk mótsett ætlanini.

Sá eina útlendska lýsing móti royking. Ein kendur rapp-bólkur stendur á myndini, í kulum húgvum og provokerandi eygnabrá. Tekstur: "Fá tær eina sigarett! - Og krabbamein, idiot!"

Sær tú, har er okkurt, sum virkar. Tá tey kulu fólkini halda tað vera taparasligt at roykja.

Kendi meg eitt sindur taparasliga!

Kanska hevði Fyribyrgingarráðið ikki tannáringar og hálvbarnsligar konur í tonkunum. Kanska var hetta ein lýsing til vaksin, skilagóð fólk, sum eru kedd av, at tey ikki klára at halda uppat. Men akkurát líka skeivt rakt.

Um almennu Føroyar meina, at tær vilja hava roykjarar at leggja av, hví so ikki brúka pengarnar upp á nakað, sum rakar - bara onkran av málbólkunum?

Eg skal geva Fyribyrgingaráðnum nøkur spor at ganga eftir - um hetta ráðið nú er fult av fólki, sum ikki tora sjálvi út í ymsu roykikrókarnar á arbeiðsplássum (man hevur jú hoyrt um skaðarnar av passivari royking, ikki satt...)

Roykjarar eru bundnir av nikotini. Teir ræðast abstinensirnar, tá ongar sigarettir eru inni. Teir eru bundnir av einum evni, sum er verri at sleppa frá aftur enn heroin. Tað er álvarsligt!

Heroin-misnýtarar fáa metadon og vera innlagdir. Havi aldrin hoyrt um nakran rúsevnisnýtara sum helt uppat, tí hann hevði sæð eina lýsing..

Roykjarar ræðast at taka uppá. Ið hvussu er konur, sum roykja.

Og roykjarar brúka nikotin at stressa av við, at hugna sær við, at hugsa av.

Tilsamans er myndin tann, at tað er RINGT at leggja av at roykja. Ikki ein spurningur um endiliga at vilja hava eitur og krabbamein í lunguni - at tora ella ikki at tora at roykja. Í okkara misnýtaramjørka eru vit langt burtur frá rationellari vigan av fyrimunum og vansum við at roykja!

So - um Fyribyrgingarráðið vil fyribyrgja krabbameini, so átti lýsingin kanska at verið vend móti fólkunum á pengakassanum. Gev okkum eina mynd av einum politikara, sum sigur "eg tori so ikki at lata vera við at geva roykjarum frítt nikotintyggigummi og uppihald á avvenjingarstovni!!"

Vikuskifti

Postboks 76, 110 Tórshavn, telefon 311820, telefax 314720, teldupostur: turid@sosialurin.fo
Blaðstjórn: Turið Kjølbro



# Nú hvørvur verjugarðurin hjá Hitleri

Leivdirnar av vestara verjugarðinum hjá Hitlertýsklandi verða nú brotnar niður. Tað, sum einaferð varð hildið at borga fyri trygd Týsklands, verður nú mett sum ein vandi fyri trygdina, men vandin fyri nýnazismu telur eisini

*Árni Joensen*

Í Týsklandi eru maskinur og menn farin undir at bróta seks verjuvirkir í gamla vestara verjugarðinum hjá Hitlertýsklandi niður. Umframt at bróta verjuvirkini niður, skulu maskinurnar fylla skotgravir og serligar gravir, sum skuldu fjala týsku stríðsvognarnar, ið skuldu verja Das Vaterland ímóti einari innrás vestaneftir. Men sambært teimum, sum nú sita við valdið í Berlin, eru tey gomlu verjuvirkini og tær gomlu skotgravirnar vandamikil fyri trygdina, sum tikið verður til, men myndugleikarnir halda eisini, at tey gomlu krígsminnini kunnu gerast savningarstaðir hjá nýnazistum.

Søgufólk og gamlir menn, sum einaferð gjørdu tænastu í tí máttmikla týska herinum, halda harafturímóti, at verjuvirkini eiga at verða varðveitt. Verjugarðurin, sum er einar 630 kilometrar til longdar, og sum røkkur frá sveitsiska markinum til Kleve har norðuri í Týsklandi, er bygdur í árunum frá 1936 til 1940, og søgufólkini og teir gomlu hermenninir vilja vera við, at verjugarðurin er ein søguligur minnisvarði, sum týskarar eiga at varðveita.

Men teir dukandi oljutrýstborirnir, sum taka seg niður ígjøgnum teir tjúkku armeraðu betongveggirnar í verjuvirkjunum fram við Rhinenánni, boða frá, at myndugleikarnir hava eina aðra áskoðan, og at arbeiðið at bróta tann fyrsta partin av verjugarðinum niður er byrjað í skógarlendinum við bygdina Rheinau tætt við franska markið.



*Upprunaliga bygdu týskararnir umleið 20.000 verjuvirkir til at verja landið ímóti innrás vestaneftir, men í dag stendur bert helmingurin av Siegfried-linjuni eftir. Tey flestu av hinum virkjunum vórðu oyðiløgd stutt eftir, at teir sameindu brutu seg ígjøgnum verjugarðin í 1944-45 - eitt átak, sum kostaði tíggjutúsundtals hermonnum lívið*

## Minni um fortíðina

Upprunaliga bygdu týskararnir umleið 20.000 verjuvirkir til at verja landið ímóti innrás vestaneftir, men í dag stendur bert helmingurin av Siegfried-linjuni eftir. Tey flestu av hinum virkjunum vórðu oyðiløgd stutt eftir, at teir sameindu brutu seg ígjøgnum verjugarðin í 1944-45 - eitt átak, sum kostaði tíggjutúsundtals hermonnum lívið.

Eftir ætlanini hjá myndugleikunum skulu millum 100 og 200 verjuvirkir brótast niður um árið, og vanliga verður tað gjørt eftir áheitan frá teimum kommunalu myndugleikunum á staðnum ella teimum, sum eiga lendið, har verjuvirkini standa. Myndugleikarnir hava gjørt greitt, at teir ætla at bróta nógv tey flestu virkini niður, men at ætlanin er at varðveita nøkur hundrað teirra, sum skulu standa eftir sum søguligir minnisvarðar.

Søgufólk vísa á, at tað ber ikki til at beina fyri fortíðini við at bróta partar av henni niður, og tey hava ístaðin skotið upp, at øll tey verjuvirkini, sum eftir eru, verða varðveitt.

- Í veruleikanum er spurningurin, hvussu vit fara um hesi minni frá fortíðini, sigur søguprofessarin Hans-Ulrich Thamer, sum starvast á lærda háskúlanum í Múnster. Eftir hansara tykki eiga myndugleikarnir annaðhvørt at royna at varðveita øll verjuvirkini ella at bróta øll niður, og sjálvur hellir hann til ta fyrru loysnina, sjálvt um hann ikki heldur tað vera neyðugt at varðveita øll.

Teir gomlu týsku hermenninir halda, at tað at bróta verjuvirkini niður er at vanvirða teir túsundtals hermenninar, sum doyðu undir seinna heimsbardaga. Stuðul fáa teir frá umhvørvisfólki, sum siga, at tey gomlu verjuvirkini hava týdning fyri umhvørvið og náttúruna, tí nógv ymisk djór leita sær skjól í teimum gomlu betongbygningunum, tá okkurt er á vási.

## Kundi ikki takast

Hitler helt tann vestara verjugarðin hava so stóran týdning, at hann setti 500.000 mans til at gera verjuvirkini og skotgravirnar, og hann gav boð um at nýta 20 prosent av øllum tí týska byggitilfarinum til endamálið.

Tá arbeiðið byrjaði í 1936, segði Hitler, at verjugarðurin skuldi byggjast sum eitt svar upp á tann franska verjugarðin, ta sokallaðu Maginot-linjuna. Men tá Týskland trý ár seinni leyp á Póland og harvið byrjaði seinna heimsbardaga, gjørdist brádliga greitt, hvør tann veruliga ætlanin við verjugarðinum var: Hann skuldi verja Týskland ímóti einum bretsk-fronskum álopi, meðan tann týski herurin bardist eystanfyri.

Í eygum Førarans og teirra, ið vóru kring hann, var vestari verjugarðurin høgt í metum, og sangir og hetjufrásagnir um garðin fingu týskarar at kenna á sær, at eingin kundi taka seg inn um garðin, og at eingin tískil kundi gera Týsklandi mein. Men veturin 1944-45 brutu amerikanarar seg ígjøgnum verjugarðin eftir harðar og blóðugar bardagar, og virkini, sum skuldu verja Týskland, gjørdust nú goymslur hjá fíggindanum.

## Ræðast nýnazistar

Tann fyrsta áheitanin um at bróta verjuvirkini niður kom í sjeytiárunum, tá ein níggju ára gomul smágenta í Rheinau datt niður á eina jarnstong á einum verjuvirki og doyði. Síðani hevur málið javnan verið frammi, og nú er arbeiðið so sett í verk.

Men vanlukkan í Rheinau er ikki tann einasta orsøkin til, at samveldismyndugleikarnir í Berlin hava gjørt av at beina fyri teimum gomlu verjuvirkjunum. Virkini eru sum ein garður fram við týska vesturmarkinum, og myndugleikarnir bera ótta fyri, at nýnazistar fara at nýta tey gomlu virkini sum savningarstaðir.

- Eg havi ikki hoyrt, at teir hava nýtt virkini til hetta endamálið, men eg kann væl ímynda mær, at teir kunnu fara at gera tað, tí verjugarðurin er ein av teimum fáu leivdunum frá Triðja Ríkinum, sigur Andreas Kúbler, sum er leiðari á stovninum, sum stendur fyri arbeiðinum at bróta verjuvirkini niður.

Við Rheinau, har arbeiðið er byrjað, eru fýra verjuvirkir. Tvey teirra eru so illa farin, at lítið og einki er eftir av teimum, og hóast hini bæði røkkka einar tíggju metrar upp í loft, høvdu tey neyvan hildið í mong ár afturat. Aðrastaðni eru 6500 verjuvirkir longu tærd burtur av tíðarinnar tonn ella stikað inni.

Men nøkur teirra verða varðveitt. Hildið verður, at umleið 600 verjuvirkir verða nýtt sum goymslur og annað, og í Trier og Pimasens hava tey valt at nýta virkini til fornminnissøvn. Í Berlin vænta myndugleikarnir, at eini 2500 verjuvirkir verða standandi - í hvussu er fyribils.